# *Um virðið í einum smíli*

- Tað kostar onki, men avrikar nógv.
- Tað ríkar tey, sum fáa tað, uttan tó at taka nakað frá teimum, sum geva tað.
- Tað hendir í einum eygnabragdi, men fløvar mangan alt lívið.
- Eingin er so ríkur, at honum ikki tørvar tað, og eingin er so fátækur, at hann ikki fær givið burtur av tí.
- Tað skapar gleði í heiminum, vælvild í arbeiði og er tekin um vinarlag.
- Teim troyttu er tað hvíld, dagslýsi teirra, sum hørm eru, teirra sorgarbundnu er tað sólskin og verjir í allari neyð.
- Eingin kann keypa tað ella bidda tað ella stjala tað, tí tað ger ongum nakað verðsins gagn, fyrrenn ein hevur givið einum øðrum tað.
- Um onkur skuldi verið ov upptikin og ov troyttur at smílast til tín, ger tá so væl at smílast til hansara.
- Ongum tørvar so mikið eitt smíl, sum honum, sum onki smíl eigur eftir at lata frá sær.
- Um tú vilt vinna tær vinarlag, er reglan henda:

*Smíl*

